# Greiningar av føroyskum bókmentum

**Forlagið Modtryk gevur út bók eftir Maluna Marnersdóttir, sum eitur Analyser af færøsk litteratur. Í bókini førir høvundin okkum gjøgnum týðandi tíðarskeið og ritverk í føroyskum bókmentum**

BÓKMENTIR
*Turið Kjølbro*

Síðst í hesum mánaðinum gevur danska forlagið Modtryk út bók eftir Maluna Marnersdóttir, sum eitur Analyser af færøsk litteratur. Tað er Jens Cramer, sum hevur skipað og ritstjórnað bókina.

Í bókini førir Malan Marnersdóttir okkum gjøgnum týðandi tíðarskeið og ritverk í føroyskum bókmentum. Eisini eldri bókmentir verða viðgjørdar, serliga elstu kvæðini og ávirkanin tey hava havt á nýggjari føroyskar bókmentir. Ástøðiliga bakgrundin fyri greiningarnar er lutvíst kvinnugranskingin seinnu árini, lutvíst nýggjari bókmentaástøði.

Bókin er bygd upp av níggju pørtum, sum upprunaliga eru skrivaðir í tíðarskeiðnum frá 1986 til í fjør, men eru endurskoðaðir til hesa útgávuna. Fyrsti parturin er yvirlit yvir føroyskar bókmentir frá kvæðunum til í dag.

Malan Marnersdóttir er cand. mag. í norðurlendskum og fronskum, ph.d. frá lærda háskúlanum í Odense í 1986 og dr. phil, frá lærda háskúlanum í Århus frá 2000. Hon er rektari á Fróðskaparsetri Føroya og lektor í norðurlendskum bókmentum har. Malan Marnersdóttir hevur skrivað fleiri bókmentavísindaligar bøkur, sum allar eru komnar út í Føroyum.

Analyser af færøsk litteratur eftir Maluna Marnersdóttir kemur út 26. mars. Bókin er 175 blaðsíður og kostar 198 krónur.




# Familjan ein møguleiki ella ein forðing


*– Tað hevur stóran týdning fyri fakligu menningina hjá teimum, sum arbeiða í psykiatriini, at ein ráðstevna av hesum slag verður hildin í Føroyum, sigur Eydna Iversen, nevndarlimur í felagnum Føroyska Psykiatriskar Sjúkrasystrar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**- Familjan hevur ein týdningarmiklan leiklut, tá ið ein sálarsjúkur í familjuni skal í viðgerð. Fyrr var rákið soleiðis, at tey avvarðandi ikki vórðu tikin við í røktini. Í dag ásannar psykiatriin, hvussu stórt gagn tað ger at hava familjuna við, sigur Eydna Iversen, nevndarlimur í felagnum Føroyskar Psykiatriskar Sjúkrasystrar, sum í summar skipar fyri stórari ráðstevnu, har familjan er høvuðsevnið**

RÁÐSTEVNA
*Turið Kjølbro*

Seint í summar verður stór norðurlendsk ráðstevna hildin í Norðurlandahúsinum í Føroyum fyri psykiatriskar sjúkrasystrar. Evnið á ráðstevnuni er familjan - ein møguleiki ella ein forðing, ásannandi, at familjan spælir ein størri leiklut í dag í viðgerðini av tí sálarsjúka.

Skráin fyri ráðstevnuna, ið verður í døgunum 29. august til 1. september, fevnir yvir tríggjar dagar og er rættiliga rúgvismikil.

– Tað hevur stóran týdning fyri fakligu menningina hjá teimum, sum arbeiða í psykiatriini, at ein ráðstevna av hesum slag verður hildin í Føroyum. Tað er avgjørt umráðandi at ljóskastarin verður settur á psykiatriina. Ikki minst nú Heimsheilsustovnurin WHO hevur lýst árið í ár sum alheims sálarheilsuár. Onkusvegna verður hetta økið undirmett og ikki virt so nógv. Vit skulu stríðast fyri okkara faki rættiliga nógv. Við ráðstevnuni vóna vit, at politikarar, myndugleikar og onnur lata eyguni upp fyri psykiatriini. Á øðrum deildum á Landssjúkrahúsinum verður tosað um at skifta tól út og annað. Á psykiatrisku deild eru vit starvsfólk tólini. Orkan liggur bara í okkum starvsfólkum, sigur Eydna Iversen, nevndarlimur í felagnum Føroyskar Psykiatriskar Sjúkrasystrar, stytt FPS. Felagið varð stovnað í 1995 og hevur 50 limir.

Tað er ikki av tilvild, at familjan er sett á skránna fyri hesa ráðstevnuna.

– Eisini innan psykiatriina verður ásannað, at familjan er og verður ein týdningarmikil partur, tá ið ein sálarsjúkur í familjuni skal í viðgerð. Fyrr var rákið soleiðis, at tey avvarðandi vórðu sett til viks og ikki vórðu tikin við í røktini. Í dag sær psykiatriin, hvussu stórt gagn tað ger bæði fyri familjuna og tann sjúka at hava familjuna við, tí tann sjúki er mangan so illa fyri. Nógv sjúk búgva eisini heima, tí so fáir bústovnar eru í Føroyum, sigur Eydna Iversen.

## Alheimskendir trupulleikar

PSSN, sum er norðurlendski felagsskapurin fyri psykiatriskar sjúkrasystrar, skipar annað hvørt ár fyri ráðstevnu av hesum slag. Hetta er fyrstu ferð, at ráðstevnan verður hildin í Føroyum. Higar koma fyrilestrahaldarar úr Norðurlondum og Onglandi, sum eru frammarlaga á hvør sínum øki, at tosa um viðkomandi evni, øll í sambandi við høvuðsevnið, sum er familjan. Nina Smebye, granskingarleiðari í Noregi, fer at tosa um, tá ið mamma ella pápi eru sjúk, og Allan Holmgren, magistari í psykologi frá Keypmannahavnar universiteti, fer at tosa um familjuarbeiði, har hann tekur útgangstøði í samleika og sálarligum líðingum. Ein føroyskur fyrilestrahaldari er og tað er Tórmóður Stórá, ið er lækni undir útbúgving til serlækna í psykiatri. Hann fer at tosa um títtleikan av sjálvmorðum, sum er broyttur í vesturheiminum í áttati- og nítiárunum.

Eydna Iversen heldur ikki, at vit kunnu tosa um serlig føroysk fyribrigdi, tá talan er um psykiatri.

– Psykiatriskir trupulleikar eru rættiliga alheimskendir. Aðra staðni er stórt rúsevnismisbrúk millum sálarsjúk. So er ikki enn í Føroyum. Hjá teim sálarsjúku speglast mentanin ofta í sjúkuni, t.d. síggja vit, at sjúkan vísir seg við religiøsum árinum, sigur Eydna Iversen.

## Verkstøð

Á ráðstevnuni vera eisini workshops við nógvum áhugaverdum verkevnum.

– Evnini á verkstøðunum eru øll í tráð við fyrilestraevnini, men meiri ítøkilig, har luttakararnir arbeiða við ávísum evnum. Til dømis tá ið viðgerðartilboðið ikki er nóg mikið til ta truplu familjuna, hvørji ynski og tørv hava tey avvarðandi, tá ið ein í familjuni hevur sálarliga sjúku, hvussu verður hugburðurin broyttur millum starvsfólk soleiðis at tey síggja tey avvarðandi sum samstarvspartnara, og nógv onnur evni, sigur Eydna Iversen.

Ráðstevnan er ikki eittans fyri psykiatriskar sjúkrasystrar.

– Hon er avgjørt eisini viðkomandi hjá teimum, ið arbeiða innan heimarøktina, ergoterapeutar, fysioterapeutar, læknar, sálarfrøðingar og onnur, sigur Eydna Iversen.

Enn er ov tíðliga at siga, hvussu nógv fara at taka lut á ráðstevnuni, men nevndin í føroyska felagnum miðjar ímóti at hava í minsta lagi 300 luttakarar.

Hóast skráin fyri ráðstevnuna er rúgvismikil, er eisini pláss fyri undirhaldi av ymiskum slag. Listamaðurin Edward Fuglø ger huglagskollasjur undir sjálvari ráðstevnuni. Gentukórið Cantabile og Kári Sverrison syngja, og Hans Tórgarð frá Grímu framførir einmansleikin Van Gogh. Eisini verða útferðir og veitsludøgverði við øllum, ið til hoyrir. Flogfelag Føroya skipar fyri ferðunum hjá luttakarunum og fyri útferðunum. FPS hevur fingið nógvar sponsorar til ráðstevnuna.



# Gjøgnumførd góðska

**Hereford í Klaksvík skarar framúr sum matstova. Umhvørvi og matur renna saman í eina sannførandi eind, sum er trupul at fáa betri**

*Eyðun Klakstein*


*Hvítleyksstokti lambsryggurin er ein gloypibiti, og Hereford-búffurin eitt verdugt miðpunkt í máltíðini*

Matstovan Hereford í Klaksvík er matstova við gjøgnumførdari góðsku, hugnaligum umhvørvi og hóvsemi. Hereford ger akkurát passaliga nógv burtur úr á øllum økjum. Einki við at yvirdríva matarlepar, umhvørvi ella pynt, men harafturfyri er tað gjørt trygt og gott.

Matstovan er klassisk, stílrein og framúr hugnalig. Smáir básar, bjálkar úr træi og livandi ljós gera matstovuna intima og heita. Ljósið er passaligt, og hitin tað sama. Einki er sum at sita á eini matstovu, har tað er ov kalt ella ov heitt, men tað er ikki trupulleikin her.

Matstovan heldur til í einum gomlum bygningi, sum einferð í tíðini hýsti møblasølu og møblaverkstaði.

Inni í sjálvari matstovuni er gamli stílurin ráðandi. Endaveggurin á húsinum, áðrenn bygt var uppí einaferð í tíðini, er partur av matstovuni, og ymsastaðni liggja lutir frá teirri tíðini, tá møblaverkstað var her.

Ein høvil, ein pumpa og ein ómetaliga sjarmerandi svartur límovnur stuðla undir stílinum á matstovuni.

## Passaligt er orðið

Vit fáa eitt borð innast á matstovuni, har tað kennist sera fjálgt at sita.

Útsýnið er nakað keðiligt – ein gulur miðnámsskúli og ein av høvuðsgøtunum í býnum eru beint uttan fyri vindeygað – men tað er nú ikki útsýnið, tú fert á matstovu fyri at uppliva, so hetta órógvar ikki, uttan tú avgjørt vilt hava tað at órógva.

Matarlepin er passaliga stórur, passaliga føroyskur, og frágreiðingarnar um rættirnar eru passaliga langar. Einki við at spæla stórsnútað ella óneyðuga fínt, men heldur einaferð passaligt, gott og gjøgnumført.

Eg biði um rækjubland og ein hvítleyksstoktan lambsrygg við stoktum eplum, grønmeti og sós. Hinumegin borðið verður biðið um hummarasuppu og Hereford steak við grønmeti og kryddarasmøri.

## Eksklusivt

Hereford hevur áður fingið sera góð skoðsmál fyri matin, og tað kann bara endurtakast her. Her er eingin vegur uttan um – hetta er matstova sum skarar framúr. Maturin hevur gjøgnumførda góðsku, og har tú fært júst tað, tú biður um.

Rækjubland hevur júst rætta blandið av salati og rækjum, hitin er tann rætti, og passaligt er við dressingi. Hummarasuppan sær elegant út, liturin dregur, og miðskeiðis í suppuni er eitt lítið tyssi av rækjum. Tað riggar bæði sum pynt og sum fylla í suppuni.

Hvítleyksstokti lambsryggurin er ein avbjóðing fyri seg. Hesin gloypubitin á seyði svíkur heldur ikki. Hann er passaliga stoktur og moyrur.

Ein lítil sveisisk eplapannukaka á tallerkinum er eitt frálíkt yvirraskilsi, og tað kennist ekslusivt at seta tenninar í egyptiskar bønir, sum ongantíð hava verið frystar á vegnum til Føroya.

Hereford-búffurin ber av. Júst so reyður, sum hann varð umbiðin, og sera moyrur. Eitt verdugt miðpunkt í máltíðini!

Punktum verður sett við einum typiskum føroyskum kaffimunni. Og tá punktum er sett er tú eisini eitt kulinariskt upplivilsi ríkari.


*Matstovan er hugnalig, heit og klassisk*


*Hereford í Klaksvík skarar framúr sum matstova*

